# PROGRAMMFÓLKASTARV
## í Sjónvarpi Føroya

Eitt starv sum avloysari fyri programmfólk í farloyvi er leyst at søkja í Sjónvarpi Føroya.

**Uppgávur:** Starvið er í høvuðsheitum knýtt at tíðindadeildini, og tann ið verður settur fer fyrst og fremst at arbeiða á Degi og Viku og við at gera aktuellar sendingar. Í sjónvarpinum eru tó fleiri programmøki, og kann tí við jøvnum millumbilum eisini gerast talan um aðrar uppgávur á programmøkinum.

**Førleikakrøv:** Útbúgving og royndir sum tíðindafólk, ella aðra viðkomandi útbúgvin og arbeiðsroyndir. Vit vænta okkum harafturat, at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og hevur hollan kunnleika til føroysk samfelagsviðurskifti og til føroyskt mál.

**Løn og setanartreytir:** Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Starvið verður at seta skjótast gjørligt, og er tíðaravmarkað til 30. juni 2005.

Umsóknir við prógvum, viðmælum og CV verður at senda til Sjónvarp Føroya, postboks 21, 110 Tórshavn, og skulu verða okkum í hendi í seinasta lagið tann 20. desember.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Sjónvarp Føroya, tlf. 340400, og tala við Øssur Winthereig, tíðindaleiðara.

svf

Sjónvarp Føroya, M.A. Winthersgøta 1, 100 Tórshavn

SISERO 351800



Lesið Sosialin - so eru tit við






i Sosialurin



**Klaksvíkar Sjúkrahús**
FO-700 Klaksvík

### Deild A - Kirurgisk seingjardeild

## Sjúkrarøktarfrøðingur og heilsuatstøðingur/ sjúkrahjálpari

Vegna farloyvi søkja vit eftir sjúkrarøktarfrøðingi at arbeiða 0,9 tíð frá 01.01.05 - 31.08.05 og heilsuatstøðingi/sjúkrahjálpara at arbeiða 0,7 tíð frá 01.01.05 til 31.12.05 ella eftir nærri avtalu.

Arbeitt verður í skiftandi vaktum.

**Førleikakrøv:**
Prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur/heilsuatstøðari.
Fakligan áhuga og royndir innan kirurgiska økið.
Góð samstarvsevni.

### Deild M - Medisinsk seingjardeild

Vegna farloyvi søkja vit eftir einum sjúkrarøktarfrøðingi at arbeiða 0,8 tíð frá 01.01.05 - 31.12.05 og einum sjúkrarøktarfrøðingi at arbeiða 0,5 tíð frá 01.01.05 til 31.08.05 ella eftir nærri avtalu.

Arbeitt verður í skiftandi vaktum.

**Førleikakrøv:**
Prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarð frøðingur.
Fakligan áhuga og royndir innan sjúkrarøkt.
Góð samstarvsevni.
Ynskiligt er við royndum innan økið.

Lønar- og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag.

Nærri fæst at vita um størvini frá:
Anna Løwe Sørensen, deildarsjúkrarøktarfrøðingur, deild A tlf. 455463 lokal 519.
Synnøva Hansen, deildarsjúkrarøktarfrøðingur, deild M tlf. 455463 lokal 403.
Jona Nielsen, fyristøðukvinna tlf. 455463 lokal 106.

Umsókn, saman við prógvi og autorisation, verður at senda til: Umsjónarmannin, Klaksvíkar Sjúkrahús, FO-700 Klaksvík.

**Umsóknarfreist: Mikudagin 22. desember 2004, kl. 12.00.**



Sosialurin
Veðrið Bilar Lýsingar Tíðindi Viðmerkingar Ítróttur Nøvn Skráir Tiltøk
Sosialurin